Jón Ásbergsson

# “Íslendingar ætla ikki at eta føroyska marknaðin”



Jón Ásbergsson – leiðari í útflutningsráðnum

**Jón Ásbergsson, leiðari í Handilsráðnum í Íslandi, metur at túrurin til Føroya verður sera gevandi fyri vinnulívið í Norðuratlantshavinum. Hóast ferðalagið hjá forsætismálaráðharranum ikki er á almennari ferð, so roknar Jón við, at nógv kann spyrjast burturúr eini tílíkari ferð. “Í eini verð sum minkar í heilum, er tað týdningarmikið, at vit royna at fylgja við”, sigur hann**




Jón Ásbergsson á vinnuráðstevna í Kina

### Vinnuráðstevna

Jón Ásbergsson sigur í samrøðu við Sosialin, at tað bara er einaferð áður, at hann hevur sæð tílíkan áhuga fyri at sleppa við á eini tílíkari handilsferð. Tað var tá ið ein sendinevnd uppá 100 fólk fór til Kina at kunnað seg um vinnumøguleikar har. Á Føroyaferðini verða 65 fólk við, og hetta vitnar um ein sera stóran áhuga í tí vinnuliga sambandinum landanna millum.

Eitt annað, sum Jón heldur verða spennandi er, at so stórur munur er á fólkatalinum í londunum báðum. “Tað er áhugavert at íslendingar og føroyingar kunnu kappast á jøvnum føti, hóast at tað er rímiliga stórur munur á fólkatalinum. Hetta, at vit økja um heimamarknaðin, er ein sunn menning sum vit leingi hava bíða eftir.

### Uppfinna ikki djúpa tallerkin

Jón Ásbergsson sigur at vit helst ikki skulu roknað við, at alt fer at blóma beinanvegin. “Tað er ikki so, at vit finna eina spildurnýggja verð, tí íslendingar og føroyingar hava leingi samstarvað vinnuliga”.

“Hetta er fyrst og fremst eitt frálíkt høvi hjá okkum øllum, at heilsa uppá hvønn annan, og umgangast á ein meiri persónligan hátt. Soleiðis styrkja vit bondini sum longu eru har, men tað er sjálvandi eisini gott, um vit finna nýggjar hættir at samstarva”, sigur hann.

“Vit vóna, at onkrar fyritøkur finna saman, og harvið skapa eitt nýtt samstarv. Vit vilja so fegin hava eitt blómandi vinnulív í Íslandi og Føroyum, og tískil er tað gleðiligt, um vit síggja okkurt nýtt samstarv taka seg upp”.

Tað eru nógvir møguleikar at gera íløgur í báðum londum, og tað er eyðsæð, at her er tað næstan bara hugflogið sum setur avmarkingina, heldur Jón Ásbergsson.

### Heimurin minkar

Tað er týdningarmikið at hava í geyma, at heimurin minkar í heilum, vil Jón vera við. “Vit síggja eitt rák runt um í heimi, at fyritøkur víðka um sín heimamarknað, og hetta eru vit eisini farin at síggja her uppi hjá okkum. Globaliseringin ella internationaliseringin er komin fyri at verða, og vit mugu taka ímóti hesum rákum heldur enn at ræðast tey”.

Hann vísur á, at onkrar íslendskar fyritøkur longu hava voksið seg ov stórar til heimamarknaðin, men at hesar fyritøkur altíð syrgja fyri, at tann lokali kundin í Íslandi, ikki kennir seg gloymdan, hóast fyritøkan einamest arbeiðir á altjóða marknaðinum.

### Íslendski marknaðurin er opin

“Ofta hoyri eg føroyingar og íslendingar skemta um, at Íslendingar fara eta allan føroyska marknaðin. Men tað verður neyvan veruleiki”, sigur Jón Ásbergsson flennandi.

“Vit skulu hava í geyma, at tá ið londini samdust um fríhandilsavtaluna, gjørdist íslendski marknaðin eisini víðopin, so har er onki til hindurs fyri, at føroysk vinnufólk kunnu keypa seg inn har. Íslandssáttmálin er eitt tekin uppá, at vinnulívið í Íslandi og Føroyum hevur tað gott. Vit skulu fegnast um, at hesi grannalondini samstarva so væl”, sigur Jón Ásbergsson at enda.

---

# Íslendingar vælkomnir til Føroya



Løgmaður bjóðar íslendskari vinnulívsnevnd og forsætisráðharranum í Íslandi vælkomnum til Føroya

**Løgmaður bjóðar íslendskari vinnulívsnevnd og forsætisráðharranum í Íslandi vælkomnum til Føroya**

VINNUSAMSTARV

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Tað kann tykjast sum talan er um eina íslendska innrás til Føroya, men tað er væl eisini eitt gott høvi hjá føroyskum vinnulívi at skapa sambond og fáa samband við møguligar vinnuligar samstarvspartnarar hinumegin og eisini at vísa á føroyskar loysnir í tí vinnu teir arbeiða við. So hetta er væl ein felags møguleiki hjá bæði føroyskum og íslendskum vinnulívi at skapa sambond.

Sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, nú ein stór íslendsk sendinevnd kemur til Føroya í næstum.

Løgmaður bjóðar íslendingum vælkomnum. Hann leggur dent á, at tað er gjøgnum samstarv, at vit skulu blíva sterk. Men tað er greitt, at vit mugu ikki bara fokusera uppá teirra møguleikar her men so sanniliga eisini uppá okkara møguleikar har. Íslandssáttmálin letur upp okkara heimamarknað, sum er ein av heimsins minstu marknaðum til at blíva seks ferðir so stórur. Tað skuldi verið eitt øgiligt lop fyri føroyskt vinnulív.

Jóannes Eidesgaard heldur vit kunnu læra av íslendingum, tá ræður um at skaffa sær nýggjar marknaðir. – Henda vitjanin hjá íslendska vinnulívinum er bert ein av mongum, og hetta fær meg eisini at hugsa um týdningin, at vit sjálvir fara út í onnur lond, sum eitt nú til India. Tað er týdningarmikið, at eitt land sum Ísland ella Føroyar, tekur ovasta leiðaran við sum duraopnara, tá talan er um skapa nýggjar samstarvsmøguleikar. Eftir tað kemur so vinnulívið og troytir møguleikar.

Løgmaður heldur tað vera sera áhugavert fyri okkum at gera sum íslendingar, nevniliga at troyta møguleikarnar fyri samvinnu við eitt nú eysturstrond USA. – Her er ein marknaður, sum vit høvdu áður men sum vit tíverri hava mist, men íslendingar eru á veg inn aftur har og eg ivist ikki í, at tað ber hjá okkum eisini til at fáa eitt samstarv upp at standa, og tað var væl eitt av endamálunum við ferðini hjá Bjarna Djurholm í USA herfyri.

Løgmaður heldur tað tí vera eitt gott hugskot, at vit og íslendingar í felag fara út í verðini at vísa fram okkara vinnulív.

### Hittast

Tað er greitt, at løgmaður og íslendski forsætisráðharrin fara at hava samrøður, nú stór sendinevnd kemur til Føroya. Løgmaður sigur, at hann ætlar sær eisini at fáa eina frágreiðing um, hvussu er stætt við íslendska búskapinum, nú so nógv hevur verið frammi í miðlunum seinastu tíðina um íslendska búskapin.

– Eg vil sjálvandi nýta høvi at hitta íslendingar og vita, hvussu støðan er hjá teimum og hvussu teir kunnu menna samvinnuna við Føroyar.

Jóannes Eidesgaard vísir til Hoyvíkssáttmálan, sum gevur nógvar nýggjar møguleikar fyri samvinnu millum londini. Eitt nú vísir hann á, at tað er gott, at íslendingar duga at síggja møguleikar fyri samvinnu við føroyskt vinnulív.

– Vit mugu nú taka Hoyvíkssáttmálan upp og vita, hvat er skilagott í næstum.